# Nólsoyingur lívverji hjá Bruntdland

**Soleiðis hevur lívið hjá Gunnar Larne laga seg. Tað, sum skuldi verða ein ferð út um landoddarnar at síggja heimin, endaði sum lívsverk í Noregi. Har hevur hann bæði roynt lívið á minstu løgreglustøð í landinum, og verið lívverji hjá eitt nú Gro Harlem Bruntdland og Jan P. Syse**

LÍVSLEIÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er hektiskur aktivitetur um alla bygdina, tá vit báðir Gunnar Larne og undirritaði sessast í køkinum á Gurðnarveggi niðri við keiina.

Gurðnarveggur – helst upprunaliga Guðrunarveggur – er barnaheimið hjá Gunnari, og eisini har, hann heldur til, tá hann ferðast aftur í Føroyum.

- Eg vaks upp í einum heimi, har náttúran hevði stóran týdning, og longu frá barnsbeini sleit eg mínar skógvar suðuri á Urð við fleygastong í hond, minnist Gunnar Larne.

Hann tók realskúla í Havn og fór síðani til skips við Kúrberg, sum sera dugnaligi skiparin Birgir Simonsen førdi. Gunnar sigldi í tvey ár, men tá var útferðarlongsulin komin á hann.

- Eg vildi sleppa út í heim at síggja meg um. Ikki bara í Norðanlondum, men longur suður í verð. Eg fór fyrst til Noregi, tí eg hevði nakað av familju har, og síðani var ætlanin at fara suður í Europa og síðani finna ein kjans við einum farmaskipi og so síggja tíðina ann, hvar leiðin gekk, sigur Gunnar.

Tað tók nakað nógva tíð í Noregi, tí har var so nógv áhugavert at uppliva. Eitt »vátt« heystarkvøld stakk tað seg upp á hann, at fara at lesa til student. Og hann so gjørdi.

- Tað tók tvey ár, og síðani skuldi eg gera av, hvat eg skuldi gera, antin eg skuldi fara heim ella ikki. Men mín politiska sannføring gjørdi, at eg helt, at eg saktans kundi brúka tvey ár av mínum lívi at verja vesturlendska demokratiið, so tað endaði við, at eg fór á ein yvirhermannaskúla, sigur Gunnar Larne.

Á skúlanum skuldi nógv ymisk skeið takast, og millum annað skuldi hann læra at aka á skíðum, nakað, sum hann av góðum grundum ikki hevði lært heimanífrá.

- Men júst hendan veturin stóð illa til við kava á lægru økjunum, so eg mátti læra hetta kynstrið við at aka á skíð tvørtur um Hardangarvidda. Og hetta var sera strævið, greiðir Gunnar frá.

Endin var kortini góður, og eftir at hava tjent sína vernaskyldu, hevði Gunnar hug at fara at lesa jura.

## Í trygdartænastu

- Men eg hugsaði við mær sjálvum, at eg heldur mátti læra fakið frá grundini av, og tí gjørdi eg av at fara á løgregluskúla fyrst, sigur útlagni nólsoyingurin.

Sum hugsað so gjørt, og í 1977 var hann so útbúgvin løgreglumaður.

Eftir eitt tíðarskeið kom Gunnar so inn í trygdartænastuna, og tað førdi við sær, at hann við tíðini gjørdist partur av trygdini rundan um forsætisráðharran og aðrar norskar ráðharrar.

Hann vil illa til at tosa um hetta, men tá vit beinleiðis spyrja sigur hann:

Ja, hetta er jú nakað fólk hava sæð í sjónvarpinum, so tað er lítil meining í at dylja tað. Eg var lívverji og trygdarvørður hjá norsku forsætisráðharrunum í fimtan ár, men eg kann sjálvandi ikki fara í smálutir um nakra hending hesa tíðina, sigur Gunnar Larni.

Men hetta merkti, at tú eisini ferðaðist alla staðni, har norski forsætisráðharrin fór?

Ja, eg ferðaðist nokk so víða um heimin. Um vit taka umhvørvisráðstevnuna í Rio de Janeiro í 1992, so var eg har, sigur Gunnar.

Hann hevur eisini verið í londum í Afrika, Asia, Europa, Suður- og Millumamerika og USA. Har hevur millum annað verið í ST-bygninginum í New York, og í Hvítu Húsunum. Hann hevur enntá traðkað inn í Ovala Rúmið, tó uttan at forsetin var til staðar.

Hann hevur enntá búð á Watergate Hotel, har demokratiski flokkurin hevði eina skrivstovu, ið gjørdist heimskend, tá brotið varð inn í hana, eitt innbrot sum førdi til, at Nixon mátti leggja frá sær sum forseti í USA.

## Ghandi og Treholt

Gunnar Larne minnist, at hann einaferð sat á 47. hædd á einum hotelli í New York og hugdi út yvir býin.

Hvar fara fólk sunnudagstúrar við børnum sínum, hugsaði eg. Har fáir grønir blettar vóru at síggja, og tá eg nú búgvi við skógini á aðrari síðuni og rættiliga fríum lendi hinumegin – og enntá eri vaksin upp í Nólsoy – so má eg siga, at eg als ikki hevði kunna livað eitt slíkt stað, sigur Gunnar Larne.

Men sum lívvaktur og trygdarvørður hjá forsætismálaráðharranum ansaði Gunnar ikki bert eftir Brundtland og øðrum ráðharrum, hann var eisini partur av verjuni hjá vitjandi statsleiðarum.

Um vit taka nýggjastu dømini, so kunnu millum annað nevnast Bill Clinton og Boris Jeltsin. Men fleiri aðrir statsleiðarar vitjaðu jú eisini Noregi, og har vóru bæði generalar og diktatorar ímillum. Og so var hann eisini partur av trygdini, tá Indira Ghandi vitjaði í Noregi. Øll minnast jú, at bara fáar vikur eftir, at hon var komin heim aftur, varð hon myrd av einum av sínum egnu trygdarvørðum.

- Og tað var nakað, sum fekk meg at hugsa, tí hesin maðurin var jú í fylginum á ferðini til Noregs, sigur Gunnar Larne.

Hann hevur eisini havt við aðrar kendar persónar at gera, um enn ikki allir vóru kendir fyri tað góða.

Mær er komið fyri oyra, at tú eisini var við til at ansa eftir Arna Treholt, tá hesin var saksøktur fyri landasvik?

Ja, dregur Gunnar á, tað passar, at eg var við til at ansa eftir honum undir báðum rættarmálunum. Tað var eisini sum trygdarvørður, sigur Gunnar.

Meiri vil Gunnar Larne ikki siga um síni fimtan ár sum lívverji og trygdarvørður hjá summum av heimsins mætastu statsleiðarum. Og tað er á sín vís skilligt, havandi í huga, at hann røkkur persjónsaldur í mars mánaði komandi ár.

## Njóta sítt otium

Men sjálvt um tað ljóðar sum meiri enn eitt fulltíðarstarv at vera lívverji hjá mætastu politisku persónum í Noregi, so hevur Gunnar Larne nógv onnur jørn í eldinum. Hann er politiskt aktivur í lokalsamfelagnum, og er formaður í felagnum Norsk-Færøysk Lag. Hann skipar eisini sum privatpersónur fyri ferðum til Føroya. Tað plagar at vera annaðhvørt ár.

Í fjør royndi hann, sum naka nýtt, at fara heilt norður í norðurendan á Noregi at starvast sum løgreglumaður í átta mánaðir.

Tað var norðuri í Passvik dalinum, ið liggur sum ein kíli inn í Finnland og Russland. Hetta er minsta løgreglustøð í Noregi við bara tveimum løgreglumonnum. 40 kilometur eru til nærmasta handil, og dalurin er ógvuliga tunt fólkaður. Har eru eisini nógvar bjarnir, einar 35 í tali til eina og hvørja tíð í dalinum, sigur Gunnar.

Og tað kundi hann hugsa sær at roynt aftur, um høvið beyðst.

Men nú ætlar hann sær fyrst at njóta Ovastevnuna, áðrenn hann mánadagin fer yvir aftur til Noregs at ganga sítt seinasta róðurtørn.



*Gunnar Larne við harpunini, sum stóð í hvalinum, ið rak á land í Nólsoy, og hvørs kempur nýttar at gera heiðursportri í Nólsoy. Á harpunini stendur C. L. Dragsberg, Tønsberg. Nólsoyingurin Jóhannus Joensen úr Heiðriksstovu, sum hevur verið skipari á norskum skipum alt sítt lív og býr nerhendis Tønsberg, hevur gjørt kanningar í hesum sambandi og er komin fram til, at Dragsberg var ein svenskur jarnsmiður, sum flutti til Tønsberg. Hann gjørdi ymiskt jarnsmíð, millum annað hvalaharpunir. Hetta er ein sonevnd kaldharpurn, sum teir nýttu áðrenn Svenn Føyn uppfann granatharpunina*



*Gunnar Larne tosar her við fróðarmannin Høgna Thomsen, sum eisini veit væl at siga frá hendingini, tá hvalurin – og harpunin – rak á land í Nósoy*